# VIRÐISLØNIRNAR REGNA NIÐUR YVIR ANU JOHNSSON

TÍÐINDASKRIV



Síðani Ana Johnsson í fjør gav út fløguna The Way I Am hevur ikki skortað á herðaklappum og viðurkenningum til kendu svensku songkvinnuna. Stakfløgan We Are, úr filminum Spiderman 2, fór beinleiðis inn á 8. pláss á almenna bretska sølulistanum, og Ana Johnsson fekk um somu tíð ein hóp av virðislønum ymsastaðni runt um í heiminum.

Í heimlandinum fekk hon víðagitnu Rockbjørnina í samband við debutfløguna The Way I Am og bleiv eisini kosin Best Newcomer. Atkvøðugreiðslan var almenn og yvir ein millión sviar høvdu atkvøtt.

Í Japan fekk hon í februar mánaða eisini virðislønina sum ársins besta nýggja navn, um somu tíð sum ein rúgva av øðrum londum eisini valdu at geva teirra fagna til kennar við líknandi viðurkenningum. Størsta herðaklappið mundi tó vera tá ið hon fyrr í ár fekk ein sonevndan Boarder Breaker Award frá EU Kommissiónini á MIDEM tiltakinum í Fraklandi fyrr í ár.

*Framhald av s. 3*

Á veg til Danmarkar leggur Norröna at í Hetlandi. Hesi 21 ferðafólkini hava helst tá skilt hvønn veg tað bar – ella rættari sagt: ikki bar – tí tá Norröna legði at landi í Hetlandi fríggjakvøldið, ætlaðu tey at stinga av í land.

Hetta fekk løgreglan á staðnum forðað fyri. Hóast nakað av ófriði stóðst av hesum, so slapp eingin teirra til rýmingar. Nakað seinkað legði Norröna so frá landi og helt leiðina, sum ætlað til Hanstholm.

Í gjárkvøldi, tá Norröna kom til Hanstholm, stóð so løgreglan á staðnum fyri teimum, og tekur nú hond um hesar 21 sigoynarnar.


WWW.SMYRIL-LINE.COM



# HARMONIKU TÚRURIN

29.-31. AUG.







Aftur í ár er vælumtókti harmonikutúrurin á skránni í ár. Harmonikutúrurin er fyri øll, ið dáma harmonikutónleik og at dansa til langt út á náttina.

Sum vanligt luttaka fleiri góð og kend føroysk harmonikulið á túrinum. Fyriskiparar verða Fimmbogi Lisberg og Pauli Jacobsen

| | |
|---|---|
| Couchettir | 900,- |
| 4 k. kamar innan | 1.000,- |
| 4 k. kamar uttan | 1.100,- |
| 3 k. kamar innan | 1.300,- |
| 3 k. kamar uttan | 1.500,- |
| 2 k. kamar uttan | 1.800,- |

Prísurin fatar um ferð fram og aftur á farleiðini Tórshavn-Bergen (matur og drykkjuvørur ikki íroknað).

Bíleggið ferðina NÚ
34 59 00

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370
FO-110 Tórshavn · Tlf: 34 59 00
Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

FYRI HVØNN ÚR KR. 900,-

SMYRIL LINE

**Droym tað ikki – royn tað!**



# Havnar Bio

kall Coca-Cola




**Batman Begins** FRUMSÝNING

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | 25.07 | kl. 19.45 | kl. 23.00 |
| Týsdag | 26.07 | kl. 19.45 | kl. 23.00 |
| Mikudag | 27.07 | kl. 19.45 | kl. 23.00 |




**A Lot Like Love** FRUMSÝNING

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | 25.07 | kl. 18.30 | kl. 20.45 |
| Týsdag | 26.07 | kl. 18.30 | kl. 20.45 |
| Mikudag | 27.07 | kl. 18.30 | kl. 20.45 |




**Bøllebob og Smukke Sally**

| | | |
|---|---|---|
| Mánadag | 25.07 | kl. 16.30 |
| Týsdag | 26.07 | kl. 16.30 |
| Mikudag | 27.07 | kl. 16.30 |




**Hostage**

| | | |
|---|---|---|
| Mánadag | 25.07 | kl. 22.30 |
| Týsdag | 26.07 | kl. 22.30 |
| Mikudag | 27.07 | kl. 22.30 |




**Sahara**

| | | |
|---|---|---|
| Mánadag | 25.07 | kl. 17.15 |
| Týsdag | 26.07 | kl. 17.15 |
| Mikudag | 27.07 | kl. 17.15 |

www.bio.fo • Telefon 31 19 56

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu